# Heini hevur álit á skrivaranum

**Heini O. Heinesen, fyrrverandi formaður í landsstýrismálanevnini, hevur fult álit á skrivaranum og løgfrøðinginum hjá nevndini, hóast Føroya Rættur leggur avgerðina hjá nevndini til grund fyri avgerðini um at lata Jógvani S veiðiloyvið aftur**

DÓMURIN
*Edvard Joensen*



Tað er skeivt av rættinum at blanda landsstýrismannanevndina upp í úrskurðin, sum rætturin hevur gjørt, sigur Heini O. Heinesen, fyrrverandi formaður í landsstýrismálanevndini. Rætturin blandar ting saman, sum einki hava við hvørt annað at gera, sigur hann.

Tað, sum landsstýrismálanevndin hevur gjørt, er í lagi. Vit hava gjørt eitt juridiskt tilmæli við ráðgeving frá skrivara okkara, og tað haldi eg framvegis vera rætt. Eg sovi væl, og fari fegin í fongsul restina av lívinum fyri eitt slíkt mál. So vísur eri eg í, at tað, sum nevndin gjørdi, er rætt.

Fiskimálaráðið bað um at verða dømt í hesum málinum, sigur Heini O. Heinesen, og tað er rættiliga álvarsligt heldur hann.

Landsstýrismálanevndin hevur ikki givið nøkrum boð um nakað sum helst. Hon hevur bara gjørt eitt tilmæli um, hvussu hon heldur, at málið var umsitið.

Tað er eingin ivi um, at at tað var skeivt av landsstýrismanninum at taka loyvi aftur frá skipinum, sum framman undan var altið tí. Tað, sum var skeivt, var at lovyið nakrantíð varð latið, staðfestir Heini O. Heinesen.

*Føroya Rættur blandar ting saman, sum einki hava við hvørt annað at gera, sigu Heini O. Heinsen, fyrrverandi formaður í landsstýrismálanevndini, sum hevur fult álit á tí, skrivarin hjá nevndini hevur rætt henni til*

Tað var tað, sum málið snúði seg um. Nú blandar rætturin fleiri ting saman við at blanda landsstýrismálanevndina upp í eitt mál um at taka eitt loyvi aftur

– Jacob Vestergaard handlaði undir politiskum trýsti, sigur Heini O. Heinesen, og heldur, at hansara politisku partamenn, Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, avgjørt ikki eru uttan skuld í, at málið er komið hertil. Teir søgdu greitt við landsstýrismanin, at um hann ikki gjørdi, sum hann gjørdi, so varð hann frákoyrdur.

Nú skapar hetta málið eitt fyridømi, og nú er avgjørt væntandi, at fleiri fara at koma aftur um aftur og vilja hava fiskilolyvi á hesum grundarlagnum, sigur Heini O. Heinesen. Hann hugsar sær til allar teir, sum hava fingið avslag upp á umóknir um fiskiloyvir.

– Vit kunnu gott rokna við, at nú fer línuskipaflotin upp á eini 30 skip, og so verður einki til nakran, sigur hann.

Hann harmast um, at tann stýring, hesi árini hevur verið á fiskivinnuni, nú fer fyri einki. Nú er tað gjørt lógligt at flyta skip millum bólkarnar, og so hava vit sagað greinina, vit sita á, av, sigur Heini O. Heinesen.

# Fiskimálaráðið tigandi

**Fiskimálaráðið vil ikki gera viðmerkingar til dómin í Føroya Rætti, fyrr enn avgerð er tikin um, um málið skal kærast til Landsrættin**

*Dómurin*
Edvard Joensen

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, vil ikki gera viðmerkingar til dómin í málinum um fiskiloyvið hjá Jógvani S.

Landsstýrismaðurin sigur seg hava gjørt sær nakrar tankar um málið, meðan tað hevur verið ávegis í rættinum, men hann vil ikki siga, hvat hann hugsar, fyrr enn hann saman við sínum løgfrøðingum hevur gjørt av, hvussu farið verður víðari fram fyrisitingarliga.

Hann sigur seg hava fingið dómin og lisið hann saman við viðmerkingunum. Nú verður so umhugsað, hvønn av teimum tveimum møguleikunum, ið eru, Fiskimálaráðið skal velja. Annaðhvørt at taka við dóminum ella at kæra hann til Landsrættin.

Tað eydnaðist ikki, áðrenn blaðið fór til prentingar, at fáa viðmerking frá reiðarínum. Men sakførarin hjá reiðarínum hevur áður sagt við Sosialin, at um úrslitið av sakarmálinum verður, at reiðaríið fær viðhald, verður farið at arbeiða við at krevja endurgjald fyri mista inntøku.

Nú hevur reiðaríið fingið viðhald í Føroya Rætti. Partarnir hava tvær vikur til at umhugsa dómin.



*Rætturin hevur talað og sagt, at Jógvan S skal hava fiskiloyvið aftur frá Fiskimálaráðnum*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Tað var politiskt rætt

*Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður, ásannar, at hann gjørdi eitt fyrisitingarligt mistak, men handlaði politiskt rætt*



**Jacob Vestergaard, fyrrvernadi landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sigur, at hann handlaði rætt politiskt, tá loyvið til Jógvan S varð tikið aftur**

DÓMURIN
*Edvard Joensen*

Tað var rætt politiskt at taka loyvið til Jógvan S aftur, sigur Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrsmaður við fiskivinnumálum. men hann ivaðist í, um tað var umsitingaliga rætt, og hann hevur nú fingið váttað frá Føroya rætti, at tað var tað ikki.

Sum politikari hevði eina greiða fatan av, hvat ynski var, sigur Jacob Vestergaard. Har var eingin ivi um, at hann suldi taka loyvið aftur.

Tað sma kann sigast út frá teirri niðurstøðu, landsstýrismálanevndin kom við.

Men hann sigur greitt, at hann hevur ikki veirð undir poltiiskum trýsti, soleiðis at skilja, at hann varð trýstur av samgongumonnum at taka ta støðu, hann tók, men helt sjálvur, at tað var rætt at fylgja løgtingsins vilja.

Aftan á er lætt at siga, at tað átti at verið øðrvísi. Men støðan var tann, at líka mikið hvat landsstýrismaðurin hevði gjørt í hasum málinum, hevði tað verið sagt at verið skeivt.

Jacob Vestergaard heldur, at landsstýrismálanevndin ehvur spælt sín leiklut lidnan.

Hann ehldur ikki, at tað er brúk fyri hesi nevndini meira, nú vit hava fingið Løgtingsins umboðsmann. Har kunnu slík mál viðgerast, sigur hann.

Hinvegin er ikki so nógv at seta fingurin á,av tí, han gjørdi, sigur jacob Vestergaard. Har er týðuliga staðfest, at mannagongdin hjá Fiskimálaraðnum, tá upprunaloyvið varð givið í 2002, var røtt.

Jacob Vestergaard kennir seg ikki tyngdan av málinum. Hann sigur, at hann hevur gjørt eitt mistak, men einki ólógligt.

– Tá tú arbeiðir, hendir tað, at tú gerst okkur mistak. Men tað er stórur munur á at gera eitt mistaks og at gera nakað ólógligt, sigur hann.





*Enniberg við bryggju í Havn. Ein stór last, sum verður seld í Bretlandi – í kapping við eitt nú russiskan og norskan fisk, sum reiðaríini senda til virkingar í Kina.*
*Mynd: Terji Nielsen*

Bílig arbeiðsmegi í Kina:

# Minkar um inntøkuna hjá føroyskum flakamonnum

**- Tað eru bæði russisk og norsk skip, sum fiska, avhøvda og heilfrysta fiskin í blokk. Tá ið túrurin er av, senda reiðaríini fiskin til virkingar í Kina og selja hann virkaðan á bretska marknaðinum. Hóast langa flutningin og tað, at fiskurin verður seldur bíligari í Bretlandi, loysir hetta seg betur fyri russisku og norsku reiðaríini enn at virka fiskin umborð, sigur Mortan Johannesen, reiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri kom flakatrolarin, Enniberg, aftur úr Barentshavinum við 850 tonsum av flaki. Hesin túrurin hevur vart í hálvan triðja mánaða. Teir byrjaðu at fiska í norskum sjógvi og endaðu í russiskum sjógvi.

Enniberg hevur seinastu dagarnar ligið við molan í Havn, men í dag loysa teir aftur og fara niður til Bretlands at selja. Mánadagin byrja teir at lossa í Grimsby.

Skipari hendan túrin hevur verið Sonny Johannesen, sum saman við stýri-manninum, Jógvani Líggjas Gregersen og 36 øðrum monnum, hevur ført hesa stóru lastina til lands.

Mortan Johannesen, reiðari, sigur, at fiskiskapurin hendan túrin hevur verið góður.

### Lágir prísir

Tað hevur ljóðað, at manningarparturin er einar 250.000 krónur, men tað vil reiðarin ikki vátta.

Spurdur, hvussu tað gongur at sleppa av við flakið í Bretlandi, sigur hann, at tað ongantíð er nakar trupulleiki at selja veiðina, men prísirnir eru einki at reypa av.

- Prísirnir á flaki eru nevniliga skrambláðir niður í ár og hava ikki verið so lágir í langa tíð, sigur Mortan Johannesen.

Fara vit eini átta ár aftur í tíðina, var prísurin á flaki tó væl lægri, enn hann er í dag.

### Bílig framleiðsla

Reiðarin vísir á, at ein orsøkin til stóra prísfallið seinasta árið, er, at nógvur russarafiskur og norskur fiskur er á marknaðinum, og hesin fiskurin fer fyri minni prís enn tað, sum føroysku reiðaríini vilja hava.

- Tað eru bæði russisk og norsk skip, sum fiska, avhøvda og heilfrysta fiskin í blokk. Tá ið túrurin er av, senda reiðaríini fiskin til virkingar í Kina. Í Kina er bílig arbeiðsmegi. Fiskurin verður arbeiddur við hond, og hvørt einstakt bein verður pilkað úr flakinum. Úr Kina verður fiskurin fraktaður á bretska marknaðin, og hóast hann verður seldur bíligari enn eitt nú fiskurin, sum vit koma við, liggur meira eftir hjá norðmonnum og russum enn hjá okkum.

Mortan Johannesen sigur, at ilt er at spáa um, hvussu gongdin verður.

### Færri mans

Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, veit at siga, at færri mans eru við teimum skipum, sum fiska, avhøvda og frysta í blokk, og tí verða eisini færri um býtið.

- Eg havi skilt, at tað loysir seg væl fyri reiðaríini at senda fiskin til virkingar í Kina, og eg havi eisini skilt, at manningin fær væl burtur úr, sigur hann í eini stuttari viðmerking.

# Enniberg hevði fleiri miljónahál á túrinum

**- Eg havi ongantíð áður upplivað, at fiskiskapurin eystan fyri hevur verið so góður í so langa tíð sum hesaferð. Á øllum túrinum var eingin dagur miseydnaður, sigur skiparin á Ennibergi, Sonny Johannesen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyri eini tíð síðan skrivaðu norsk bløð um eitt av størstu hálum í søguni, tá ið Enniberg fekk eini 60 tons av ráfiski í einum háli, meðan teir royndu í norskum sjógvi. Norsk bløð skrivaðu, at hetta var eitt miljónahál – eitt hál, sum í ráfiski var vert eina heila miljón!

### Fleiri miljónahál

Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, sigur, at hann frætti um umrøðuna, hetta eina hálið fekk, men vísir á, at teir høvdu onnur hál, sum vóru á leið líka so stór. Eitt av hesum var seinasta hálið, teir høvdu á túrinum. Hetta var í russiskum sjógvi.

- Eg havi ongantíð upplivað, at fiskiskapurin eystan fyri hevur verið so góður í so langa tíð. Um hesa tíðina í fjør var nógvur fiskur at fáa í russiskum sjógvi, men í ár hevur bara verið so nógv meira at fingið.

Skiparin sigur, at á øllum túrinum var eingin dagur miseydnaður.

### Yvirvaksin toskur

- Vit høvdu góðan fiskiskap í norskum sjógvi, og tá ið vit komu í russiskan sjógv, 29. februar, komu vit í rættiligan rokfiskiskap.

Hann vísir á, at hetta er góð fiskitíð, bæði í norskum og russiskum sjógvi.

- Áðrenn vit fóru í russiskan sjógv at royna, vóru vit á Røstbankanum, sum er gýtingarleið, og har var bara yvirvaksin toskur at fáa.

Skiparin sigur, at fiskurin, teir fingu í russiskum sjógvi, serliga í byrjanini var ógvuliga góður.

### Upp til Bjarnoynna

Sonny Johannesen, sum eisini verður skipari á Ennibergi komandi túr, veit at siga, at teir væntandi fara ein stuttan túr upp til Bjarnoynna eftir páskir.

- Har kunnu vit fiska eini 100 tons av flaki, sigur hann.

Tá ið Enniberg kemur aftur undan Bjarnoynni, fara teir í Irmingarhavið at royna eftir kongafiski.

# Grót er dagligur kostur

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Umframt tungu ferðsluna, sum koyrir við gróti, koyra bilar við ruski gjøgnum bygdina og bilar, sum koma við høvdum og eftir høvdum av Høvdavirkinum, sigur leirvíkingur.

Eftir greinina, vit høvdu í Sosialinum í gjár um tungu ferðsluna gjøgnum Leirvíksbygd, hevur ein lesari í Leirvík vent sær til blaðið.

- Tit skriva um tað eina óhappið, har grót datt av einum lastbili og á vegin. Men tað er dagligur kostur, at størri og smærri grót dettur av bilunum, sum koyra gjøgnum bygdina.

Umrødda greinin var ein samrøða við bygdarráðsformannin í Leirvík, Sjúrð Eliasen. Somuleiðis skiftu vit orð við sýslumannin í Eysturoy, Kristian Martin Joensen.

Sjúrður helt, at ferðslan eftir umstøðunum hevur gingið hampiliga væl, og at koyringin av gróti úr undirsjóvartunlinum fer fram í neyvum samstarvi millum teir, sum hava ábyrgdina av koyringini og ferðslunevndina hjá Leirvíkar bygdarráði.

Sýslumaðurin staðfesti, at løgreglan ikki hevur verið boðsend í samband við hesa koyring, men vísti á, at nú tunga ferðslan í oynni er so nógv økt, heldur løgreglan sjálvsagt eyguni eftir, at alt gongur forsvarliga fyri seg.

Lesarin í Leirvík vísir á, at tað er ikki bara koyringin úr undirsjóvartunlinum, sum órógvar leirvíkingar, sum búgva við vegin, har tann nógva ferðslan gongur.

- Umframt tungu ferðsluna, sum koyrir við gróti, koyra bilar við ruski gjøgnum bygdina og bilar, sum koma við høvdum og eftir høvdum av høvdavirkinum.

Lesarin sigur seg ivast í, um allir bilførarar halda seg til hámarksferðina, sum sambært ferðsluskeltinum er 30 kilometrar um tíman.